


# Korando við ektaðum jeep-designi

*Ssangyong Korando er ein passaliga stórur og snøggur jeepur við ektaðum jeep-designi*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Tað eru nú nøkur ár síðan koreansku Ssangyong jeeparnir komu higar til lands. Umframt Rexton er nú eisini ein minni jeepur, Korando, komin á føroyska marknaðin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Ssangyong jeeparnir við Rexton á odda hava rættuliga fingið fótin fastan í Føroyum, og eru teir kappingarførir bæði í útsjónd, prísi og dygd.

Teir fyrstu Ssangyong jeeparnir vit sóu her um okkara leiðir vóru Musso jeeparnir, sum komu miðskeiðis í 90-unum.

Suðurkoreanska Ssangyong verksmiðjan, ið er meira enn 50 ára gomul, byrjaði at samstarva við Mercedes-Benz í 1991. Hetta samstarv hevur mest snúð seg um menning av motorum og girkassum.

Korando er ein passaliga stórur snøggur jeepur við ektaðum jeep-designi, kenguru-gittari framman og gáttum undir síðuhurðunum.

Eins og Ssangyong Rexton, hevur Korando eisini Mercedes-Benz motorar, hann fæst við 150 og 220 hk bensinmotorum og einum 5 syl. turbodiesel við 120 hk.

Bilurin 426,0 cm langur og 185,5 cm breiður og klárar seg serstakliga væl á ósløttum undirlendi uttan fyri vanliga koyrivegin. Tað at bilurin er lutfalsliga stuttur, ger sítt til at hann klárar seg so væl. Aksilfrástøðan er 248,0 cm. Korando hevur spiralfjaðrar framman og aftan, gass-stoytdoyvarar, og er sum ein persónbilur at koyra.

Korando fæst bæði við føstum taki og sum Soft-Top við stórum sóltaki. Talan er um ein 4-persónajeep, ið er snøggur innan við hvítum instrumentum og alu-look panelum í instrumenborðinum og í hurðunum. Hann hevur t.d. el-rútar, sentrallás og aircondition.

Bilurin kann síggjast og roynast á Bilverkstaðnum v. Hans J. Kollsker á Hjalla.

## Ssangyong Korando 2.9 Turbo diesel

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2,9 litur 5 syl. diesel 120 hk<br>Turbo v. intercooler |
| Oljunýtsla | ca. 11,0 km/l |
| Dekkstødd | 255/65-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 426,0 cm |
| Breidd | 185,5 cm |
| Hædd | 184,0 cm |
| Eginvekt | 1.760 kg |
| Prísur | kr. 250.000 (persónbilur)<br>kr. 210.000 v. mvg (vørubilur) |
| Søluumboð | Bilverkstaðið<br>v/ H. J. Kollsker<br>á Hjalla<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 311013<br>www.kollsker.com |




*Korando fæst bæði við føstum taki og sum Soft-Top við sóltaki*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Korando er snøggur innan við hvítum instrumentum og alu-look panelum í instrumenborðinum og í hurðunum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*